

TIPS

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos
*Kelda: Aftonbladet*

# Angi ið tendrar

Ljósini kosta úr nøkrum fáum krónum og upp í fleiri hundrað krónur. Munurin á teimum bíligu og dýru ljósunum er, at tey dýru innihalda fýra, fimm ferðir so nógva parfumu sum tey bíligu. Dýru ljósini eru eisini ofta gjørd úr stearini, meðan tey bíligu eru úr paraffini, ið ikki er líka gott sum stearin. Í USA hevur rákið við angaljósum vundið nógv uppá seg seinastu árini, og eisini í handlunum í Havn siga tey, at ljósini selja nógv.

**Soleiðis velur tú rættan anga eftir hýri**

- Tá tú vil koma í erotiskan hýr: Ljós, ið anga av sandiltræ, patchouli og amber
- Tá tú vil gerast rólig: Ljós, ið anga av apelsinblómu, lavendel, bergamott
- Tá tú vil fáa orku: Ljós, ið anga av sitrónolju, eukalyptus og piparmint




**Vaniljuangandi**
og beróligandi ljós
frá Tromborg.
Klivin
**kr. 259,-**

**Franskt ljós**
ið brennur í 40 tímar.
Frú C
**200 kr**

VIT KENNA ØLL **»INTERIOR DESIGN«** – MEN **»SCENTERIOR DESIGN«** ERU TAÐ KANSKA IKKI SO NÓGV, IÐ HAVA HOYRT UM ÁÐUR. TAÐ ER AT INNRÆTTA HEIMIÐ VIÐ **ANGALJÓSUM** FYRI AT BLÍVA Í GÓÐUM LAG, RÓLIG, **EROTISK** ELLA TAÐ, TÚ HEVUR **HUG** TIL JÚST TÁ.

**Vel anga til stovu, kamar og køk**

**Kamar:** Reinar og frískar luktir, ið ikki eru ov pátreingjandi. Oftani eita slík ljós »Fresh linen« ella »Clean laundry«

**Stovu:** Vel ljós eftir tínum stíli. Um tú hevur romantiskan stíl er blómuangi góður. Býr tú í gomlum húsum, er mahogny og cedar góðir angar.

**Køkur:** Luktir av slíkum, sum tú kanst eta - til dømis sjokulátu, vanilju, kanel og basilikum.



**Day**
Klædnamerkið »Day - Birger et Mikkelsen« gera eisini angaljós.
Klivin
**kr. 229,-**




**Nývaskaður blómuangi**
»Jasmine« frá House Doctor.
Frú C
**kr. 99,-**



**Fronsk ljós**
frá Comptoir de Famille.
Tey anga av apelsin, kaffi og apelsinsjokulátu.
Frú C
**kr. 189,75**



**Blómuangi**
»Paisley« og »Fia« frá Green Gate.
Frú C
**kr. 89,-**